


# Greenpeace útsetir boring hjá Statoil

**Jan Müller**

28.05.2014 - 09:08

Oljan >

Statoil er til reiðar at fara undir at bora tað, sum hevði verið tann norðasti norski leitibrunnurin, men nú noyðist felagið at bíða við boringini, tí Greenpeace hevur latið myndugleikunum eina klagu um boringina.

Klagan liggur á borðinum hjá umhvørvismálaráðharranum, Tine Sundtoft, og fyrr enn hon hevur tikið støðu, kann Statoil ikki seta borin í.

Statoil fekk annars loyvi tann 30. apríl til at bora tann norðasta av trimum brunnum, men fjúrtan dagar seinni sendi Greenpeace myndugleikunum klagu um avgerðina. Felagsskapurin vil vera við, at tað er ikki ráðiligt at bora so nær ísrondini. Nú skal umhvørvismálaráðið so taka støðu í málinum.

Ætlanin hjá Statoil var at bora teir tríggjar brunnarnar, Apollo, Atlantis og Mercury, í tíðarskeiðinum frá mai til september í ár. Pallurin Transocean Spitsbergen skal bora.

Greenpeace hevur leingi mótmælt ætlanunum um at bora so nær ísrondini. Seinasta heyst bað felagskapurin norsku veðurstovuna gera eina lýsing av viðurskiftunum, og hon vísti, at eitt oljuóhapp á teirri ætlaðu borileiðini kann elva til dálking við ísrondina.